# TAÐ HENDIR ...

**LAGT TIL RÆTTIS:** Eyðun Klakstein



## JÓGVAN SYNGUR FYRI ALTJÓÐA KJANSI

Í annaðkvøld verður finalan í íslendska Tónleika Grand Prixnum. Ein av finalistunum er klaksvíkingurin Jógvan Hansen. Hann tekur lut við sanginum Eg Lófa og skal í annaðkvøld royna at syngja seg víðari til europeisku Eurovision-finaluna. Í fjør var Jógvan nummar 2 í kappingini. Sjónvarpið hjá Kringvarpinum samsendir við íslendska sjónvarpið.

**ÍSLENDSKA GRAND PRIXIÐ**
Sjónvarp Føroya
Leygarkvøldið 12/2 kl. 20.15



## RÁÐSTEVNA UM LANDBÚNAÐ

Leygardagin skipa Bóndafelag Føroya, Óðalsfelagið og Útoyggjafelagið fyri stórari ráðstevnu á Hotel Føroyum. Evnið á ráðstevnuni er: Alternativir vinnumøguleikar í landbúnaðinum. Ymisk fólk fara at røða um evni – millum annað tríggir landbúnaðarfrøðingar úr ávikavist Noregi, Íslandi og Grønlandi.

**LANDBÚNAÐARRÁÐSTEVNA**
Hotel Føroyar
Leygardagin 12/2 kl. 9.30



## HANUS Á TVØROYRI

Leygarkvøldið hevur Hanus G. Johansen konsert á Seglloftinum á Tvøroyri. Hanus hevur verið sera virkin seinasta árið. Hann hevur givið tvær fløgur út og spælt nógvar konsertir. Onnur fløgan var við yrkingum hjá Pól F. Joensen, og fleiri av teimum sangunum fer Hanus at syngja leygarkvøldið.

**HANUS G. JOHANSEN**
Seglloftið á Tvøroyri
Leygarkvøldið 12/2 kl. 21.00

## LOKALBRAK Í ONGLANDI

Nýríku Manchester City royna at bjóða hinum stórfelagnum í Onglandi av, og tað gongur alsamt betri hjá City. Leygardagin er veruligur stórdystur á skránni, tá ið City skal kappast við grannarnar í Manchester United, sum eru mest vinnandi enska felagið seinnu árini. Megnar City umsíðir at koppa United?

**MANCHESTER UTD-MANCHESTER CITY**
Premier League
Leygardagin 12/2 kl. 12.45






## QIVITOQ Á DVD

Qivitoq var fyrsti danski filmurin, sum varð tilnevndur til eina Oscar heiðursløn. Tað var í 1956. Erik Balling hevur gjørt filmin, sum gongur fyri seg í Grønlandi. Ein ung lærarinna kemur til Grønland fyri at yvirraska sín forlovaða, men hann liggur í ørmunum á eini aðrari kvinnu. Hon leitar sær skjól eini lítlari bygd og hittir har ein bestýrara, sum hon kemur at kenna.

**QIVITOQ**
dvd-filmur



## DANSA VILT

Hetta vikuskiftið vitjar danska dansiparið Jens og Anette Werner í Føroyum. Tey eru kend frá sjónvarpsrøðini Vild Med Dans, og tey fara at undirvísa í dansi í Havn um vikuskiftið. Skeiðið byrjar fríggjakvøldið og heldur fram leygardagin. Skeiðið verður í Dansifrøi í Havn.

**DANSISKEIÐ**
Dansifrøi í Havn
Fríggjakvøldið 11/2 og
Leygardagin 12/2